

*Fiddlers Bid fingu av álvara lív í áhoyrararnar, við teirra lívligu tónum*

# Listastevnan alstóran týdning

**– Vit sóu, eftir at Fay Weldon hevði verið her, at hon skrivaði eina orðing í eini bók hjá Gunnari Hoydal. Eivør fekk somuleiðis eitt gott og varandi samstarv við svenska bólkin The Real Group, sum vóru her í 2002. Spennandi verður at síggja, um ringar eisini fara at breiða seg frá hesi listastevnuni, sigur Oddvá Nattestad, fyrireikari**

LISTASTEVNAN
*Eydna Skaale,*
*Eydna@sosialurin.fo*

– Eg má siga, at listastevnan eydnaðist so sera væl. Yvir allar forvæntningar, sigur Oddvá Nattestad. – Vit sita júst og arbeiða við at telja upp, hvussu nógv fólk hava verið til øll hesi ymisku tiltøkini. Tað var jú so óalmindiliga nógv á skránni um alt landið, sigur hon.

Hon sigur, at tey allarflestu tiltøkini vóru betri vitjað enn frammanundan væntað. Okkurt var so eisini, sum hinvegin ikki var so nógv vitjað. Men sum heild eru tey ovfarin av undirtøkuni.

### Føroyskt og útlendskt

– Jethro Tull og Kiri Te Kanawa seldu út á sínum konsertum, men føroysku Teitur og Eivør vóru beint í hølunum á teimum, við bert nøkrum fáum plássum eftir. So tað er ilt at meta um, hvørt tey útlendsku ella tey føroysku nøvnini drógu fleiri áskoðarar, sigur Oddvá. Hon sigur víðari, at tað tyktiskt sum um føroyingar vóru ógvuliga glaðir fyri at sleppa at uppliva Teit og Eivør, sum nú fyri tað mesta spæla í útlondunum, á palli her heima aftur.

Oddvá sigur, at tey tiltøkini, ið ikki vóru serliga væl vitjað, verða tó ikki sloyfað av skránni í næsta ár. – Leygarkvøldið var t.d. ein orgulpianistur úr Noregi, sum spældi í Fuglafirði. Har vóru ógvuliga fá fólk, men tað var ein fantastiska góð konsert. Tað sama var við marionettteatrinum úr Tblisi, sum var niðri á Meiarínum. Fáir áskoðarar, men ófatuliga gott teatur. Tey fáu, sum vóru til hesi tiltøkini fingu veruliga nakað burturúr. Og tað er júst ætlanin við listastevnuni. Øll skulu fáa nakað burturúr, eisini tey, sum hava áhugamál, ið skilja seg frá fjøldini. Vit fara eftir kvaliteti til øll, sigur Oddvá.

Fyrireikararnir royna hvørt ár at fáa so nógvar listagreinir sum gjørligt við á listastevnuna. – Vit royna at hava eina fjølbroytta skrá, har tað eisini er okkurt fyri børnini, greiðir Oddvá frá.



*Ambrossia, spanskt sápubløðrusirkus. Børn og vaksin vóru bergtikin*

### Komandi stevna

Tað eru Norðurlandahúsið og býráðið, ið skiftast um at hava formansskapin í stýrinum fyri listastevnuna. Í ár var tað býráðið, ið hevði formansskapin, so komandi ár eigur Norðurlandahúsið tørn. 1. februar verður nýggjur stjóri settur, so enn er ógreitt hvør verður formaður fyri stevnuni komandi ár.

– Tað eru altíð ótrúliga nógv fólk um tiltakið, og vit royna altíð at fáa so nógv umboðað sum gjørligt. Men tað eru eisini nógvir áskoðarar, sum rætta okkum eina hjálpandi hond. Tað eru nógv, sum hava verið uttanlands og sæð eitthvørt hugtakandi ella spennandi listarligt tiltak, og so greiða tey okkum frá um tað. Soleiðis, at vit skulu hava ein møguleika at kanna tað, og møguliga fáa tað hendanveg, sigur Oddvá. Hon sigur, at tey eisini fáa sera nógvar fyrispurningar frá útlendskum listafólki, ið hava hoyrt um listastevnuna, og sum ynskja at luttaka. – Eisini eru tað fleiri, ið vísa á hvat kundi verið gjørt betri ella øðrvísi eina aðru fer, og tað taka vit sjálvandi til eftirtektar. Stevnan skal jú halda á at menna seg og gerast betur ár um ár, sigur hon.

15. september fer stýri fyri listastevnuna at byrja at arbeiða við komandi stevnu. – Vit hava nøkur ynski og vit fara so smátt at byrja at stinga út í kortið. Tað er eitt stórt puslispæl, sum skal fáast at passa, men nú tora vit betur at satsa, tí nú hava vit sæð ár um ár, hvussu góð undirtøkan er. Og tað er tað sama við sponsorunum. Teir tora betur at líta á okkum og satsa, sigur Oddvá.

– Sum sagt, so fara vit at seta okkum niður 15. september og byrja at stinga út í kortið, hvat skal henda á næstu listastevnu. Væntandi verður ein skrivikapping, tí undirtøkan fyri tí vísir seg at vera óalmindiliga góð. Men tað er einki avgjørt enn.

Eitt tiltak er tó longu fastlagt. Í samstarvi við Tivoli Management hava vit fingið Barbaru Hendrix at koma higar, so tað verður ógvuliga spennandi, sigur Oddvá Nattestad at enda

### Stevnan 2004

– Stevnan hevur gingið ótrúliga væl, og alt hevur verið í einum positivum anda. Eg haldi, at øll eru nøgd. Men eg má takka øllum stuðlunum so innarliga, tí uttan teir gjørdist lítið.

– Nú verður spennandi at síggja um listastevnan 2004 eisini fer at breiða sínar ringar inn í framtíðina. Á listastevnuni í 2002 fann Eivør saman við The Real Group úr Svøríki, og nú hevur hon júst verið á turné har yviri í samstarvi við tann bólkin. Høvundurin Fay Weldon var her, og nakað seinni gav Gunnar Hoydal út eina bók, har Fay Weldon skrivaði eina orðing. Listastevnan er við til at byggja brýr og samstørv, og tað verður spennandi at síggja, um nakað fer at spyrjast burturúr hesi stevnuni eisini, sigur Oddvá. –Í øllum førum vóna og vænta vit, at bæði okkara føroysku listafólk og tey, ið komu úr útlondunum at sýna fram sína list, hava fingið íblástur til at halda á at skapa.



*Kiri Te Kanawa. Útselt var til hennara konsert*



# SEV neyvan orsøk til alguvøkstur

**– Vit hava tosað leystliga um, hvørt vatnorkuútbyggingin hjá SEV kann hava ávirkað alguvøksturin á Funningsfirði, men tað ber ikki til á nakran hátt vísindaliga at undirbyggja, at so er. Vit vita nevniliga um slíkan alguvøkstur á Funningsfirði langt afturi í tíðini, sigur Høgni Debes á Fiskirannsóknarstovuni**

ALGUVØKSTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Allur innari partur av Funningsfirði var reyður av algum sum eftir eitt grindadráp seinasta vikuskiftið.

Fiskirannsóknarstovan kannaði algurnar og visti at siga, at talan var um tvey kend algusløg, nevniliga myrionecta rubra og scrippsiella trochoidea, harav nøgdirnar av fyrrnevnda slagnum vóru nógv størri enn av hinum. Bæði sløgini hava tó tann eginleika, at tey kundu lita sjógvin reyðan.

Kanningarnar hjá Fiskirannsóknarstovuni vístu, at talan var um kend algusløg í Føroyum sum kunnu blóma upp, tá ið umstøðurnar eru tær røttu. Stovnurin legði dent á, at hesi algusløg á ongan hátt eru eitrandi, og tí var heldur einki til hindurs fyri eta fisk ella skeljadjór av Funningsfirði, meðan algurnar vóru upp á tað mesta. Kanningarnar vístu eisini, at ein góð miljón algur vóru í hvørjum litri av sjógvi, og tað er rættiliga nógv, men ikki ókent, tá ið umstøðurnar eru til tess.



*Høgni Debes heldur, at nógva sólin og góðveðrið í síðstu viku kann hava havt sína ávirkan á alguvøksturin. Hann heldur tó ikki, at tað er hitin í sjónum, sum hevur gjørt allan munin, tí tað tekur langa tíð, áðrenn hitin í sjónum broytist nakað serligt*

Væntandi var, at algurnar fóru at hvørva, tá ið hendan vikan eru úti, og tann metingin hevur hildið.

### Næstan burtur

Høgni Debes á Fiskirannsóknarstovuni sigur, at fólk av stovninum vóru í Funningsfirði hósdagin og kannaðu fjørðin, og nú vísti tað seg, at algurnar vóru næstan burtur.

– Onkustaðni sóu vit ein færra av reyðum í sjónum, men annars sást lítið til alguvøksturin meira.

Hann væntar, at einki sæst eftir algurnar á Funningsfirði, tá ið hendan vikan er umliðin.

Fiskirannsóknarstovan hevur eina sonevnda algutænastu, har serliga firðir og sund á fastlandinum regluliga verða kannað fyri alguvøkstur. Haraftrat hevur stovnurin samband við fólk í eitt nú Suðuroy, sum kunnu boða frá, um algur síggjast uppi í sjónum.

– Algur er vanligt fyribrigdi um summarið – ikki minst á Funningsfirði, men eisini á Skálafjørðinum og øðrum firðum kring landið. Í ár hava vit tó ikki frætt um annan alguvøkstur, sum hevur verið at sæð omaná sjónum.

Høgni Debes sigur, at nógv sløg eru av algum, og tey kunnu lita sjógvin á ymiskan hátt – alt eftir, hvat slag talan nú einaferð er um.

– Hesaferð var talan um serliga stórar nøgdir, sum ikki eru sæddar so ofta í Føroyum áður. Tó vita vit um, at langt afturi í tíðini hava hesi fyribrigdi eisini gjørt seg galdandi um summarið.

### Einki samband

Hann sigur, at alguvøksturin á Funningsfirði í ár var seinni enn eitt vanligt ár, men hann heldur, at hetta kann hanga saman við, at gróðurin í ár er seinur.

– Vit halda tó ikki, at slíkur alguvøkstur hevur nakað við vanliga gróðurin í sjónum at gera, tí vit hava havt ár við nógvum alguvøkstri, tá ið góðurin annars hevur verið lítil. Í ár vísa kanningarnar, at gróðurin á landgrunninum liggur beint omanfyri eitt miðal ár. So, tað er ikki hetta, sum er orsøkin til nógvu algurnar á Funningsfirði hesa seinastu vikuna.

Høgni heldur, at góðveðrið í síðstu viku kann hava havt sína ávirkan á vøksturin. Hann heldur tó ikki, at tað er hitin í sjónum, sum hevur gjørt allan munin, tí tað tekur langa tíð, áðrenn hitin í sjónum broytist nakað serligt.

– Eg trúgvi heldur, at nógva sólin og liggjandi góðveðrið, vit høvdu, hevur havt eina størri ávirkan enn sjálvur hitin í sjónum hesar dagarnar, sigur hann.

Spurdur, um stovnurin kennur til, at vit kunnu hava eitrandi alguvøkstur í Føroyum, sigur Høgni:

– Jú, tað hava vit dømir um.

Hann vísir eitt nú á eina hending í Lopra fyri nøkrum árum síðan, tá ið fiskur á fjørðinum doyði av eitrandi algum.

– Hetta er eisini kent í Noregi, har teir stundum hava havt stórar trupulleikar við eitrandi algum sum hava gjørt av við nógvan fisk.

### SEV ikki orsøkin

Vit spurdu eisini Høgna Debes, um vatnorkuútbyggingin hjá SEV kann hava havt ávikan á alguvøksturin á Funningsfirði, nú minni feskt vatn rennur í Funningsfjørð:

– Vit hava tosað leystliga um hetta á stovninum, men tað ber ikki til á nakran hátt vísindaliga at undirbyggja, at vatnorkuútbyggingin kann havt havt nakra ávirkan á hesi viðurskifti. Tí, sum eg nevndi, so vita vit um slíkan alguvøkstur á Funningsfirði langt afturi í tíðini, og tá var eingin vatnorkuútbygging framd, sum kundi havt ávirkað alguvøksturin á fjørðinum, sigur hann at enda.

*Fiskirannsóknarstovan hevur eina sonevnda algutænastu, har serliga firðir og sund á fastlandinum regluliga verða kannað fyri alguvøkstur. Haraftrat hevur stovnurin samband við fólk í eitt nú Suðuroy, sum kunnu boða frá, um algur síggjast uppi í sjónum*



ÚTSØLAN Í SKÁLABÚÐINI OG MÓTASKÁLANUM
byrjar mánamorgunin 23. august kl. 08.30
Leygardagin 21. august er stongt
NÓGV NIÐURSETT VØRA
VÆLKOMIN INN Á GÓLVIÐ
Skálabúðin
MÓTASKÁLIN